Beinta í Jákupsstovu, granskari:

# Føroyingar vita meiri um fisk enn um fólk

**2. og 3. september var ein ráðstevna um vælferðargransking hildin í Havn. Luttakarar vóru granskarar og politikarar úr ymsum norðurlondum. Ráðstevnan endaði við einum kjaki í Norðurlandahúsinum, har bæði spurningartekin og útrópstekin vóru sett við, hvussu týdningarmikil granskingin í veruleikanum er**

RÁÐSTEVNA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Við pallborðið sótu Hans Pauli Strøm, Jógvan við Keldu, Harald Nybøen, Jón Haldvin Hannibalsson, Tom Greifenberg, Beinta í Jákupsstovu og Pál Weihe*

Í 2000 gjørdi Norðurlandaráðið eina fimm árs ætlan fyri vælferðargransking í Norðurlondum. Tveir limir úr hvørjum av norðurlondunum mynda stýrisbólkin, og Føroyar, Grønland og Áland hava hvør sín observatør.

Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á almannastovuni, er umboð fyri Føroyar, og tað var eisini hon, sum fekk í lag hesa ráðstevnuna í Føroyum.

## Hví granska?

Til spurningin »hví er neyðugt við vælferðargransking« vóru nógv svar. Hans Pauli Strøm, sum sat við pallborðið undir kjakinum í Norðurlandahúsinum, staðfesti, at hann í øllum førum er sinnaður at arbeiða fyri granskingini í Føroyum.

– Vit mugu fáa staðfest hvat er realitetur og hvat er myta innan sosiala økið í Føroyum. Tað eru nógvir pástandir, men ein granskingarverkætlan kundi staðfest hvussu tað í veruleikanum er statt, segði Hans Pauli Strøm í byrjunaruppleggið sínum. Til dømis nevndi hann okkara nógvu vælferðarstovnar, ið kundu verið betri tilpassaðir, um ein granskingarbólkur varð settur, sum kundi staðfest tørvin í mun til tilboðini.



*Petra Johnsdóttir Joensen, tók stig til at fáa ráðstevnuna hildna í Føroyum. Hon var sera vælnøgd við stevnuna*

Hans Pauli Strøm segði eisini, at tað er ógvuliga skjótt hjá einum lítlum landi sum Føroyum at gerast burtur í alheimsgeringini. Hann setti spurnaðartekin við, um fiskivinnan einsamøll fer at megna at halda á at halda samfelagnum uppi. – Vit mugu eisini kanna hvussu verandi rák kemur at ávirka okkum, sum liva av at framleiða eina matvøru, segði hann.

Kendi íslendski politikkarin Jón Baldvin Hannibalsson segði millum annað, at vælferðarsamfelagið ikki er ein sjálvfylgja, men at tað er eitt val, sum politikararnir mugu gera. Hann vísti á ymisk ástøði, sum vilja hava vælferðarstatin at vera veikari enn minimalstatin. Síðani nevndi hann dømi, ið hinvegin vístu júst styrkina við vælferðarstatinum.

– Tað hava verið nógvar røddir frammi, serliga í Amerika, sum jú er ein anti-vælferðarstatur, um hvussu skroypilig okkara vælferðarskipan er. Men teirra ástøðir eru aldri prógvað. Tvørturímóti eru tey mótprógvað! Tak Finland, sum var í stórari kreppu fyrst í hálvfemsunum, men sum nú hevur fingið heitið »Mest kappingarsinnaða samfelag í heiminum«, við »besta teknologiska infrastrukturi«. Vit kunnu taka Svøríki, sum hevur heitið »Mest nýskapandi samfelag í heiminum«. Vit kunnu taka Ísland, sum væl og virðiliga hevur reist seg eftir ovurstóru inflatiónina, sum har var. Øll hesi dømi um framgongd eru bygd á vælferðarmodellið, og tey gera so dyggiliga øll álop á vælferðarsamfelagið til skammar.

Víðari segði hann, at fyri at statirnir kunnu standa sterkastir hvør sær, er neyðugt at granska fyri at finna júst tað vælferðarmodellið, ið hóskar best til ymsu londini.

## Vita meiri um fisk enn um fólk

Beinta í Jákupsstovu, granskari, staðfesti við orðunum »føroyingar vita meiri um fiskastovnin enn um fólkastovnin«, hvussu tað stendur til við granskingini innan sosiala økið í Føroyum.

Hon segði, at um ráðstevnan snúði seg um gransking innan fisk og fiskivinnu, um hvussu alheimsgeringin fer at ávirka fiskivinnuna í framtíðini og hvat vit kunnu gera fyri at sleppa frá negativum árinum uttanífrá, so hevði salurin verið fullsettur, og áhugin fyri ráðstevnuni hevði verið ovurhonds stórur.

– Men, helt hon fram – Tað er eingin áhugi fyri vælferðargransking í Føroyum. Vit hava nógvar góðar granskarar við sera góðari kompetancu, sum ganga arbeiðsleysir. Ìmeðan eru tað nógvir sosialir stovnar, ið veruliga ynskja sær at fáa kortlagt nøkur ting, ígjøgnum granskingararbeiðið. Til dømis hevur Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum ynskt at fingið samskipað tølini fyri tørv og tilboð, tí tey eru ikki skrásett nakrastaðni. Men áhugi er ikki fyri at játta pening til hetta arbeiði.

Norðmaðurin Harald Nybøen, sum er leiðari fyri vælferðargransklingarætlanini, segði, at tað er lætt hjá smáum samfeløgum sum Føroyum at fáa gongd á gransking og skráseting.

– Tit kunnu jú hyggja hvussu langt tey størru norðurlondini eru komin við teirra skipanum. Tað er jú eingin grund hjá tykkum at uppfinna hjólið einaferð afturat. Tit kunnu standa á akslunum á hinum, og byggja víðari sjálvi, segði hann. – Øll norðurlondini líkjast so mikið nógv, at eitt land sum Noreg saktans kundi hugt at granskingarúrslitum úr Føroyum. Tað hevði gjørt tykkum til eitt áhugavert land fyri okkum at samstarva við.

Nybøen legði dent á, at hann persónliga nokk skuldi hjálpa til at fáa eitt samstarv í lag ímillium Føroyar og Noreg, um ynski var um tað.

– Um tit harafturímóti ikki gera nakað við granskingarøkið, so má eg staðfesta, at tit verða eitt fullkomiliga óáhugavert land fyri okkum, staðfesti hann.

Pál Weihe, sum eisini sat við pallborðið, segði, at tað í veruleikanum er nógv gransking farin fram innan innan heilsu- og almannaverkið, og at nógv tøl eru inn hesi økið.

– Trupulleikin er bert at finna tey. Tað er sum at leita eftir eini nál í eini sátu, staðfesti hann, tí tey eru ikki skipað nakrastaðni.

Hann skeyt upp at geva læknum og øðrum innan heilsuverkið møguleikan at taka orlov frá arbeiðnum, fyri at arbeiða við skrásetingararbeiði innan heilsuverkið.

– Nú verður so nógv tosað um, at læknar og starvsfólk innan heilsuverkið eru útbrend og stressað av ov tungari arbeiðsbyrðu. Hesi fólkini hava tørv á at sleppa burtur frá vanliga arbeiðnum. Tað vildi verið ein sera hóskilig arbeiðsbyrða fyri tey, at skásett tølini innan heilsuverkið, sum tey sjálvi og arbeiðsfelagar teirra hava kannað. Tey kundu sloppið burtur frá stressandi arbeiðsumhvørvinum í hálvt ella heilt ár, men samstundis arbeitt innan økið, og gjørt eitt sera týðandi arbeiði, ljóðaði uppskotið frá Pál Weihe.

*Framhald á síðu 7*



*Beinta í Jákupsstovu, granskari og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, hava nógv at práta um. Bæði ásanna týdningin av gransking, men eingin peningur er til økið*



Fyribyrgingarráðið:

# Øll vóru vælkomin

**– Tað stóð øllum í boði at luttaka á norðurlendsku rúsevnaráðstevnuni. Tí skilji eg ikki rættiliga, at skeinkistøðini kendu seg útihýst á ráðstevnuni, sigur Brynhild Danielsen, skrivari í Fyribyrgingarráðnum**

RÚSEVNA-RÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Skeinkistøðini høvdu sama møguleika, sum øll onnur, at tekna seg til rúsevnaráðstevnuna, sigur Brynhild Danielsen, skrivari í Fyribyrgingaráðnum*

Í blaðnum leygardagin greiddu vit frá, at bryggjaríini og gistingarhús- og matstovufelagið undraðust yvir, hví tey ikki vórðu boðin við á norðurlendsku rúsevnaráðstevnuna, sum Fyribyrgingraráðið var vertur fyri í Norðurlandahúsinum seinasta vikuskifti. Tey vóru á einum máli um, at ein slík stevna hevði verið eitt frálíkt høvi hjá teimum at lært av royndunum hjá hjá øðrum og sloppið framat við sínum sjónarmiðum um, hvussu vit í felag best loysa teir trupulleikar, ið til dømis kunnu taka seg upp á skeinkistøðunum.

## Ógjørligt at hava øll við

Brynhild Danielsen, skrivari í Fyribyrgingarráðnum, sigur, at burtursæð frá teimum almennu stovnunum, sum hava umboð í ráðnum, fekk ongin beinleiðis innbjóðing til ráðstevnuna. Men longu tvær vikur undan ráðstevnuni stóð lýsing í bløðunum, har øll høvdu møguleika at tekna seg sum luttakara á stevnuni.

Spurd, hví onki umboð frá mastovufelagnum ella skeinkistøðunum var at síggja á sjálvari skránni fyri ráðstevnuna, sigur Brynhild, at slíkt hevur ongantíð verið vanlig mannagongd á hesum stevnum, sum nú hava 20 ár á baki.

– Skráin verður løgd í einum felags norðurlendskum ráði eitt hálvt ár frammanundan, stevnan verður hildin. Høvuðsendamálið við ráðstevnuni er, at fakfólk, sum eisini virka sum ráðgevar hjá myndugleikunum, greiða frá verkætlanum og leggja fram úrslit og niðurstøður av sínum arbeiði. Fyribyrging av skaðiligu avleiðingunum av rúsevnamisnýtslu er jú eitt sera breitt øki. Tí er tað nærum ógjørligt at hava allar áhugabólkar við í skránni á eini slíkari stevnu, sigur Brynhild.

## Opin fyri hugskotum

Brynhild leggur afturat, at hetta als ikki skal skiljast sum, at Fyribyrgingarráðið í Føroyum ikki vil samstarva við skeinkistøðini.

– Vit eru altíð opin fyri øllum góðum hugskotum, ið hava sum endamál at forða skaðiligum avleiðingum av rúsandi evnum. Men arbeiðsøkið hjá Fyribyrgingarráðnum fevnir sera breitt, og tí henda tingini ikki altíð líka skjótt, sum vit kundu ynskt. Hinvegin stendur tað einum og hvørjum øðrum frítt at taka fyrsta stigið til fyribyrgjandi átøk. Og sum sagt, vilja vit fegin samstarva - eisini við skeinkistøðini, sigur skrivarin í Fyribyrgingarráðnum.

*framhald av síðu 6*

## Hvar fer peningurin?

Finnur Helmsdal, sum var einasta umboð úr tinginum, ið luttók á allari ráðstevnuni, helt, at gransking á vælferðarskipanum okkara avgjørt átti at verið hægri raðfest.

– Vit nýta eina upphædd sum líkist eini milliard árliga uppá hesar ymsu vælferðarskipaninar. Og vit hava ikki ánilsi av, um pengarnir eru væl brúktir. Vit kanna ikki, um vit kanska høvdu fingið meiri effektivitet við at nýtt peningin á ein annan hátt, um tað møguliga eru fløskuhálsar á skipanini, um okkurt átti at fingið meiri og okkurt minni. Vit gjalda bara. Tí er tað avgjørt av alstórum týdningi, at vit fara undir at kanna hvat tað er vit gjalda til, og hví vit gera tað, staðfesti hann.

Hans Pauli Strøm var samdur við hann, og hann minti á, at teknologiski infrastrukturin er á veg í Føroyum eisini.

– Vit arbeiða við eini skipan, ið skal skráseta allar sjúklingajournalir í eini telduskipan. Hetta verður fyrsta stigið, men ynskiligt hevði verið at fingið skrásett alla sosialu skipanina í tílíkum telduskipanum. Tað hevði lætt nógv um arbeiðið og hevði knýtt ymsu sosialu deildirnar nógv meiri saman, segði landstýrismaðurin í heilsu- og almannamálum. – Vit hava eisini eitt fólkayvirlit, ið ikki er heilt sum tað skal vera, og tað hevur stóran týdning eisin at fáa skrásett tað, segði hann.

Alt í alt teknaði framtíðin innan gransking í Føroyum at vera sera ljós, tí tá avtornaði, endaði kjakið við einum sera samdum pallborði, ið ásannaði týdningin av gransking og skráseting.

## Granskingarjáttanin skerd

Og jú, tað ljóðar alt samalt sera gott. At granska og finna útav hvørjar møguleikar vit sum samfelag fara at hava í framtíðini. Hvørji stig vit skulu taka, fyri ikki at hvørva í alheimsgerðingini. At finna útav hvar allur peningurin fer, sum árliga verður sprændur inn í vælferðarskipanir uttan spurnaðartrekin og uttan afturmeldingar. Og at skráseta allar føroyingar í eini telduskipan, sum ger almenna- og heilsuarbeiði lættari og greiðari. Tað ljóðar jú útmerkað.

Men spurningurin er, nær hetta fer at lata seg gera. Veruleikin er jú tann, at granskingarøkið er munandi skert á verandi fíggjarlóg. Granskarar okkara ganga arbeiðsleysir, og eftir øllum sólarteknum at døma verður meiri peningur ikki játtaður aftur í bræði.

Tað stuttliga er so sjálvsagt, at besti háttur at finna útav hvørt peningurin á fíggjarlógini verður nýttur á skilabestan hátt og um okkurt kanska kundi verið spart onkustaðni, er at seta fólk at kanna tað. Til dømis granskarar...

# Nýggj feskfiskamóttøka stovnast



*Óváttað tíðindi ganga um, at ein nýggj feskfiskamóttøka skal setast á stovn, tí stór ónøgd er við Fiskamarknaðin. Partar hava verið á fundi í Klaksvíkar býráð og spurt seg fyri, men ongin av fyrireikarunum vil vátta tíðindini*

**Sambært heimasíðuni hjá Norðlýsinum eru ætlanir um at seta eina nýggja feskfiskamóttøku á stovn. Ikki ber til at fáa hesi tíðindi váttað frá fyrireikarunum, men sum skilst eru tað pf Snodd á Eiði saman við øðrum, sum kanna møguleikarnar**

FISKIVINNA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Sambært Norðlýsinum váttar borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, at fólk hava verið á fundi í býráðnum um júst hetta málið.

Men sum skilst er tað ikki komið serliga langt enn.

Til dømis er ongin endalig avgerð, um byggjast skal ein høll ella um eitthvørt høli við vánna verður keypt ella leigað.

Sum skilst, so eru eini 12 størri útróðrarbátar og línuskip við í samtakinum, umframt teir frá pf Snodd á Eiði.

Orsøkin til hetta stigið sigst vera, at ónøgdin er stór ímillum fiskimenn um Fiskamarknað Føroya.Ført hevur verið fram, at eitt nú við at selja ígjøgnum móttøkuna á Eiði, hava menn fingið ímillum 2 og 4 krónur meira fyri kilo, verður sagt á heimasíðuni hjá Norðlýsinum.

Jóhannes Olsen frá pf Snodd hevur onga viðmerking til hetta málið og vil hvørki vátta ella avsanna tíðindini.

# Dragin gott summar

*Summarið hevur royndst stak væl hjá Draganum. Skiparin sigur, at teir hava verið ímillum 20 og 30 útferðir hetta summarið*



**Nú er útferðartíðin av, og skúlaskipið Dragin verður aftur nýttur av skúlanæmingum. Poli Mikkelsen, skipari, letur væl at og sigur, at teir hava verið nakrar túrar fleiri í ár enn í fjør**

FERÐAVINNA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Skiparin á Draganum, Poli Mikkelsen, letur væl at summarinum í ár. Dragin var nakrar túrar fleiri í ár í mun til í fjør.

– Gott nokk byrjaði vit nakað fyrr í ár enn í fjør, men túratalið liggur millum 20 og 30, greiðir hann frá.

Lágætt var mest sum alt summarið, so allar útferðirnar í ár vóru norðureftir. Í fjør vóru teir tveir ella tríggjar túrar sunnanfyri. Onkrir dagar var tjúkt í mjørka, tá lagt varð frá landi, men tá teir so komu norður um Kallin var klárt.

– Vit hava verið stak hepnir í veðrinum, sigur Poli Mikkelsen.

Hann sigur, at tað hevur verið ógvuliga blandað av ferðafólki. Bæði føroyingar og útlendingar.

Dragin siglir nú við skúlanæmingum og fyrst í oktober verður skipið lagt. Tá fara næmingarnir umborð at gera eitthvørt í sambandi við skúlan. Dragin verður so liggjandi til einaferð í mai komandi ár, tá ferðafólkini koma aftur til landið.